# Welcome to... Kollafjørð

**Leygarmorgunin løgdu fólk til merkis, at skeltið, sum Tórshavnar kommuna hevur sett upp nakað sunnanfyri Landsfjósið norðanfyri bygdina í Kollafirði, hevði broytt orðaljóð**

STAÐARNØVN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

»Vælkomin til Tórshavn« - skrivað á føroyskum og enskum - hevur staðið á hesum skelti, sum stendur stutt sunnanfyri Landsfjósið norðanfyri bygdina í Kollafirði.

Men leygarmorgunin var orðaljóðið broytt. Nú stóð knappliga ”Welcome to Kollafjørð” - og ikki til Tórshavn.



*Nú stendur ikki longur á skeltinum ”Vælkomin til Tórshavn”, men ”Vælkomin til Kollafjørð”. Onkur hevur soleiðis tikið málið í egnar hendur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Samanlegging – og tó...

Eitt er, at kommunur leggja saman. Tað skilja ivaleyst nógv, sum nakað skilagott - og kanska neyðugt.

At skipa kommunur, stovnar, fyritøkur og vinnu í størri eindir, er uppi í tíðini, og tað er ”in”, sum vit plaga at siga.

Í flestu kommunum, har fólkaatkvøða seinastu árini hevur verið um samanlegging, hevur meiriluti verið fyri hesum.

Soleiðis var eisini, tá ið kollfirðingar atkvøddu fyri samanlegging við Tórshavnar kommunu.

At onkur hevur dittað sær at broytt skeltið sunnanfyri Landsfjósið, merkir ivaleyst, at tað eru borgarar, sum halda, at umsitingin í Tórshavnar kommunu kemur sær í so væl - at skriva ”Vælkomin til Tórshavn”, tá tað er Kollafjørður, tú kemur til og koyrir ígjøgnum.

### »Upp á tíðina«

Á veg til Havnar leygarmorgunin, steðgaðu vit í einum handli í Kollafirði.

Fryntliga gentan, sum stóð aftanfyri diskin hendan morgunin, tá vit søgdu henni søguna, var ikki í iva:

– Tað er upp á tíðina, at onkur hevur skrivað tað á skeltið, sum rætt er, altso »Vælkomin til Kollafjørð« – og ikki til Tórshavn.

Sosialurin fer at venda aftur til hetta mál í øðrum blaði.

Alt rør- og ventilatiónsarbeiði verður gjørt skjótt og væl



MST-RØR Tel. 507003

6 PLETSKOT FRÁ DELTA
– HVÍ GJALDA MEIRA

NOKIA 1110i
Lítil og lætt fartelefon við innbygdum hondfríum hátalara, vibrator o.m.ø.
Vekt: 85 g.
KR. 415,-



SONY ERICSSON W200i
VGA kamera, FM-radio mp3 spælari, 128 mb m2 kort er íroknað prísin.
Vekt: 85 g.
KR. 1.235,-



NOKIA 6300
2 mp kamera, bluetooth FM-radio, mp3-spælari, stereoheadset og 128 mb micro SD-kort íroknað prísin
Vekt: 91 g.
KR. 2.175,-



SONY ERICSSON K800i
3,2 mp kamera, bluetooth, video, FM-radio, mp3 spælari.
Vekt: 115 g.
KR. 2.675,-



NOKIA N95
5 mp kamera, bluetooth video, MMS, FM-radio, mp3 spælari, micro SD-kortlesari.
Vekt: 120 g.
KR. 6.199,-



SONY ERICSSON K810i
3,2 mp kamera, bluetooth, video, FM-radio, mp3 spælari.
Vekt: 115 g.
KR. 3.085,-



DELTA
ELEKTRONIKTÆNASTAN

GONGIN 1
FO-100 TÓRSHAVN
TLF. 318050

FØROYA STØRSTA ÚRVAL AV FARTELEFONUM

Handilsleiðarar til inn
í Norðskála og til nýggjan inn handil í Tórshavn

Tað kann vera júst tær ið vit leita eftir

Leiðarastarvið í einum stórum matvøruhandli, inniber allar tær avbjóðingar og upplivingar ið nú einaferð eru at finna í einum starvi har so at siga allar hugsandi og óhugsandi støður mynda gerandisdagin. Tað krevst av tær at tú hevur førleikan, ert málsøkin og hartil hevur viljan at røkka dagliga setningin.

Vit bjóða eitt vællønt starv við lyklaorðum sum ábyrgd, úrslit og góðari tænastu til okkara viðskiftafólk. Handilsleiðarin er partur av leiðslutoyminum í inn samtakinum.

Kundi tú hugsa tær at hoyrt nærri um starvið, so ring til Jaspur Johannesen tlf. 235200, ella send tína umsókn við prógvum/ummælum til: inn Landavegur 103 FO-100 Tórshavn.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. august

Allir fyrispurningar/umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði



inn er eitt samtak við trimum stórum matvøruhandlum. Fyrsti handilin lat upp í Norðskála í 2003, næsti lat upp í Klaksvík í 2006 og tann triðji lat upp í Tórshavn somuleiðis í 2006. Fjórði inn handilin letur upp í Tórshavn seinni í hesum árinum. Umframt matvøruhandlarnar inn hevur samtaki eisini onnur áhugamál.

inn

Landavegur 103 · FO-100 Tórshavn · tel 31 37 31